# Teir hugdu skeivt eftir Jákupi



*– Í OB varð eg sera væl móttikin, og har kendi eg meg væl, men tað havi eg ikki gjørt allastaðni. Tá eg var í Crewe og vandi vóru tað nógvir, sum hugdu meira ella minni skeivt eftir mær. Tað var ikki stuttligt, sigur Jákup á Borg.*

Mynd: Álvur Haraldsen

**Jákup á Borg stílar framvegis eftir gamla dreymunum um at gerast fótbóltsspælari í útlandinum. Men hann heldur, at royndarvenjingar ofta gera møguleikan hjá einum spælara at fáa sáttmála verri. Hann hevur eisini merkt, at tað eru ikki øll, sum taka so væl ímóti einum spælara, sum roynir at fáa ein sáttmála í einum felagi**

EYÐUN KLAKSTEIN

Jákup á Borg var síðst í 90'unum størsta talentið í føroyskum fótbólti, men enn hevur tað ikki givið úrslit í tí, sum evnaríki bóltsspælarar droyma um – einum yrkissáttmála uttanlands.

Men dreymur er langt frá sleptur, og soleiðis sum kreativi spælarin hevur spælt á landsliðnum seinasta árið, er tað langt frá ógjørligt, at hann framvegis kann náa tí stóra málinum.

– Eg gangi ikki og hugsi um útlandið allatíðina, men tað er í grundini tað, sum tað snýr seg um, sigur Jákup á Borg, sum í næstum skal vera pápi. Hann hevur eisini keypt grundstykki í høvuðsstaðnum, so nú merkir hann meira til familjuskyldurnar, enn hann áður hevur gjørt.

## Royndirnar eru truplar

Jákup á Borg er ein av teimum føroysku spælarunum, sum hevur ferðast dúgliga til royndarvenjingar í útlandinum. Fyri kortum var hann í danska felagnum OB, sum var áhugað í at gera sáttmála við hann, men í fyrstu syftu kom einki burtur úr sambandinum teirra millum.

Jákup hevur áður verið til venjingar í ensku feløgunum Liverpool, Watford og Crewe.

– Royndarvenjingar gera tað næstan bara verri at fáa sáttmála í útlandinum, og tað er als ikki so skilagott at ferðast runt til hesar venjingar, heldur hann.

– Eg gangi høgt upp í tað sosiala, eg vil trívast, har eg spæli, og at koma til púra ókendar umstøður uttanlands er sera trupult. Fyri tað fyrsta kennir tú ongan, alt er øðrvísi, og so skalt tú eftir einari viku hava gjørt so nógv vart við teg, at felagið vil skriva sáttmála.

– Tað er næstan vónleyst, og ofta ger tað bara støðuna hjá tær verri, tí tú klárar ikki at vísa tað, sum tú veruliga kanst eftir so stuttari tíð og undir so truplum umstøðum.

Tí ætlar Jákup á Borg sær ikki at leypa avstað, bara onkur kjansur er at koma til royndarvenjing uttanlands.

– Um eg ikki merki, at felagið meinar tað seriøst, so fari eg ongan veg. Áhugin hjá OB var veruligur, og har er framvegis møguleiki fyri, at eg kann fáa sáttmála.

## Ymisk móttøka

Jákup á Borg hevur eisini upplivað, hvussu ymisk móttøkan kann verða, tá ið ein spælari skal uttanlands at spæla fyri einum sáttmála.

– Í OB varð eg sera væl móttikin, og har kendi eg meg væl, men tað havi eg ikki gjørt allastaðni. Tá eg var í Crewe og vandi, vóru tað nógvir, sum hugdu meira ella minni skeivt eftir mær. Tað var ikki stuttligt, greiðir hann frá.

– Teir hugsa helst, at eg royni at taka arbeiðið frá teimum, og so eru tað ikki allir, sum taka so væl ímóti einum spælara sum mær. Sjálvandi vóru tað undantøk millum spælararnar, men eg hevði ikki roknað við, at móttøkan fór at vera soleiðis, og at munurin var soleiðis ímillum Bretland og Danmark.

## Landsliðið nógv at siga

Seinastu tvey árini hevur Jákup á Borg veruliga etablerað seg sum landsliðsspælari, og í fjør spældi hann tveir frálíkar landsdystir ímóti Skotlandi og Týsklandi. Hetta er nakað, sum veruliga ger mun, tá ið tað snýr seg um útlandið, og um hann klárar at halda støðinum á landsliðnum framyvir, so er tað besti mátin at selja seg sum fótbóltsspælari.

– Ert tú ikki á landsliðnum, er tað so at siga vónleyst at sleppa uttanlands at spæla á høgum støði, men spælir tú hinvegin væl á landsliðnum, so er beinanvegin áhugi fyri tær. Tað havi eg sjálvur merkt eftir dystirnar ímóti Skotlandi og Týsklandi, sigur Jákup á Borg.

– Eg havi tað fínt í Føroyum. Eg havi eitt gott arbeiðið, og eg stórtrívist í B36. Støðið í føroyskum fótbólti er eisini so mikið høgt, at tú kanst halda teg í góðum formi til teir hørðu landsdystirnar. Tí eri eg ikki í nakrari akuttari støðu, men eg vóni at fáa kjansin uttanlands, sigur hann.

Nú fótbóltsárið er byrjað aftur, hevur Jákup á Borg sett sær nøkur mál fyri hetta árið.

– Fyrst og fremst snýr tað seg um at gerast meistari við B36. Nógv fólk vilja gera okkum til favorittar, men tað er ongantíð lætt at vinna meistaraheitið. Síðani vóni eg at halda plássið og støðið á landsliðnum, og so vóni eg eisini at sleppa uttanlands at spæla, sigur hann.




